## VIÐMERKINGAR

# Takk til Sambandsflokkin

**Jørgen Niclasen**



Vit í Vágum eiga so ómetaliga nógv at takka Sambandsflokkinum fyri. Okkum nýtist bert at taka tey síðstu árini.

Sambandsløgmaðurin í 80-unum forpurraði Gásadalsbergholið, takk fyri tað. Sambandslandsstýrismaður úr Vágum reypar um, at hann í 1989 kláraði at steðga undirsjóartunnlinum undir Vestmannasund. Sambandsløgmaðurin í 90-unum kom í 96 eftir flogvanlukkuna í Selvík við útmelding um, at flogvøllurin í Vágum var óforsvarligur, og at nýggjur flogvøllur skuldi byggjast aðrastaðni í landinum. Danir søgdu takk og knallaðu kassan í: Allar danskar útbyggingarætlanir av flogvøllinum steðgaðu, og hava danir hildið fast síðan tá. Tøkkina eigur Sambandsflokkurin.

Í 1997 skrivaði Sámal Petur Í Grund, landsstýrismaður, eitt bræv til samgongulimir, um teir hildu, at arbeiðast skuldi við undirsjóartunnli undir Vestmannasund. Sambandsløgmaðurin gjørdist so frá sær sjálvum um hesa øru ætlan hjá Sámal Peturi, at hann var uppsagdur upp á grátt pappír. Takk til Sambandsflokkin.

**Stuðulin soltin**

Í hesum valskeiðnum er sera nógv hent í Vágum, kanska meir enn nakrantíð. Byrjað er upp á Gásadalsbergholið, men allur Sambandsflokkurin atkvøddi ímóti uppskotinum at játta peningin. Takk fyri tað.

Nýggj tyrla er keypt til m.a at røkja sambandið við útoyggjar og til leiting og bjarging av sjófólki. Ikki ein atkvøða frá sambandstinglimunum var fyri. Takk fyri tann stuðulin.

Allur Sambandsflokkurin atkvøddi ímóti yvirtøku av Skipaeftirlitinum, eisini sambandstingmaðurin úr Vágum. Tað eydnaðist tó uttan Sambandið at fáa uppskotið samtykt, og kemur Skipaeftirlitið at liggja í Vágum. Sambandsflokkurin eigur takk fyri stuðulin.

Tá atkvøðast skuldi um at fáa gongd á undirsjóartunnilin, atkvøddi allur Sambandsflokkurin ímóti fasta sambandinum um Vestmannasund. Ja, trúgv tí, ið vil. Vágatingmaðurin hjá Sambandsflokkinum atkvøddi ímóti undirsjóartunnlinum. Tó skal viðmerkjast, at hann segð,i at tað var av óvart. Vit takka fyri stuðulin, har var jú næstan ein atkvøða fyri.

**Fólkaflokkurin sum ein maður**

Alt í alt eigur Sambandsflokkurin størstu tøkkina fyri at flokkurin hevur sitið í andstøðu hesi 4 árini. Tað hevur givið Fólkaflokkinum møguleika at fremja størsta framburð fyri Vágoynna nakrantíð. Í løgtingið og í landsstýrið hevur Fólkaflokkurin staðið sum ein maður fyri Vágoynna, og har hevur flokkurin við tógvið stríð við hinar megnað at fingið meirluta fyri uppskotunum, tó at hjálpin fra Sambandsflokkinum var soltin. Vit vóna, at Sambandsflokkurin verður betur í framtíðini, eisini um tað verður í samgongu. Men Sambandsflokkurin eigur størstu tøkkina fyri, at hann hevur sitið í andstøðu hetta valskeiði. Túsund takk.


# Enskt skeið á University of Aberdeen

1, 2 ella 4 vikur




**Intensive Course in Developing Language and Communication Skills**

| Tíðarskeið | Førleiki |
|---|---|
| 4. - 29. mars | Undir miðal (Early Intermediate) |
| 5. apr - 3. mai | Undir miðal og miðal (Early Intermediate og Intermediate) |
| 6. mai - 31. mai | Undir miðal og miðal (Early Intermediate og Intermediate) |
| 3. jun. - 28. jun. | Miðal (Intermediate) |
| 8. jul. - 16 aug. | Miðal og yvir miðal (Intermediate og Upper Intermediate) |

| Skeið | 1 vika | 2 vikur | 4 vikur |
|---|---|---|---|
| Fyri hvønn | 6.993,- | 11.787,- | 20.840,- |

**Íroknað prísin er:** Flogferð t/rt, skeið (20 tímar undirvísing um vikuna) skeiðtilfar. Innivist á Kings Hall, einkult kamar við bað og morgunmati og ferðaavgjald. Kings Hall er eitt Conference Centre við gistingarmøguleikum, bert fáa minuttir frá universitetinum.

Eisini er møguligt at fáa skraddaraseymað skeið eftir ynski. Hesi skeið eru ikki tíðarmerkt og kunnu gerast til einhvørja tíð um pláss er, og eru tey serliga væl egnað til fyritøkur við serligum málsligum krøvum. Les meira á www.atlantic.fo.

ATLANTIC AIRWAYS

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo


*Framhald av síðu 13*

Ferðsluæðrarnar millum Argir og Havnina mugu víðkast. Arbeiðið við Landssjúkrahúsið og nýggjar ætlanir á Argjasvinginum fara at bøta um, men tann hjálpin nøktar valla allan tørvin.

**Ytri ringvegur**

Í hinum endanum á býnum kemur ein líka langur hali av bilum til Havnar hvønn morgun. Hann kemur allur inn í býin eftir einum veg, og tað skapar trupulleikar í ferðsluni bæði á landsvegnum og inni í býnum.

Neyðugt er tí at fara undir tann ytra ringvegin úr Hvítanesvegnum. Hetta verður gjørt saman við landinum, og báðir partar hava játtað tær fyrstu upphæddirnar til ringvegin, sum skal røkka yvir í Vesturbýin og bindast í Marknagilsvegin.

**Asfaltplanurin**

Eitt árliga afturvendandi mál er asfaltplanurin. Á okkara fyrsta fundi legði umsitingin fram sína ætlan um, hvat asfalterast kundi í árinum fyri teir pengarnar, sum vóru settir av. Vit koyrdu so runt til allar hesar vegateinarnar at hyggja.

Fingu at vita, at ivaspurningar javnan taka seg upp, um kommunan nú eigur at halda hendan ella handan vegin. Tað kemur av, at enn eru nógvir vegir í kommununi, sum hon ikki hevur yvirtikið. Hetta eru typiskt vegir frá útstykkingum, sum ongantíð eru gjørdir heilt lidnir eftir forskriftunum.

Tað er ringt at hava við at gera at asfaltera summar vegir og samstundis lata aðrar í somu grannaløgum liggja í órøkt, so politikkurin er at fáa allar hesar vegirnar undir kommununa, og – um tað ber til – at fáa tey, sum áttu at gera teir, at lata teir í tí standi, sum ætlanin altíð hevur verið.

Skilti á lagnum, at á Argjum eru nógvir slíkir ivaspurningar eins og í Havnini.

**Parkeringshús og parkeringshelli**

Samstundis, sum bæði virksemi og fólkatal vaksa, verður eftirspurningurin eftir parkering alsamt størri. Eg kann ikki siga, at vit higartil hava gjørt nakað hol í sjógvin á hesum øki.

Herfyri varð samtykt, at seta parkeringstíðina á Kongabrúnni niður í ein tíma. Ein ferðslunevnd, sum býráðið og politiið eru felags um, mælti til at seta hana til tveir tímar. So hava vit tað at stríðast um eina tíð, men hetta loysir ongantíð parkeringstrýstið í býnum.

Her má takast til heilt onnur tiltøk, møguliga við parkeringshúsum, sum verða bygd upp eftir í nøkrum hæddum, og við parkeringsplássum, sum verða løgd inn í lendið.

Hugsa tær bara, tá nýggja "Norrøna" um eitt ár fer at koma fleiri ferðir um vikuna við 800 bilum, sum býurin skal slúka eftir einari løtu aftrat øllum øðrum, ið longu er í ferð við at sprongja karmarnar.

Sum er hevur býurin ikki orku til alt hetta, men kommunan hevur skyldu at loysa spurningarnar einsamøll ella saman við øðrum áhugaðum. Lata vit bara standa til, so verður ein verri glymur dansur.


# ítróttur

Nr. 20 • mikudagur • 30. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tveir føroyingar í Brøndby

**Rókur Jespersen royndarvenur í løtuni við danska stórfelagnum Brøndby. Í komandi viku fer tvøroyrarmaðurin Rasmus Nolsøe somuleiðis til Brøndby at venja. Umboðsmaðurin Jákup í Stórustovu hevur fingið avtalu í lag við danska felagið um at hyggja nærri eftir føroyskum spælarum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í hesum døgum er 16 ára gamli Rókur Jespersen úr HB til royndarvenjing í danska felagnum Brøndby. Hann hevur vant við unglingaliðnum í eina góða viku, og hann skal í næstum spæla dyst við besta unglingaliðnum hjá Brøndby.

Vitjanin hjá Róki er liður í eini avtalu, ið leikaraumboðsmaðurin Jákup í Stórustovu hevur fingið í lag við danska felagið. Talan er sostatt ikki bara um tann eina leikaran, ið fær møguleikan í royna seg í Brøndby.

Í komandi viku leggur Rasmus Nolsøe, ið dagliga spælir við TB, eisini leiðina til Keypmannahavnar at spæla fótbólt, har hann verður í nakrar vikur. Rasmus Nolsøe er somuleiðis 16 ára gamal.

Jákup í Stórustovu sigur, at talan helst verður um enn fleiri leikarar, ið fara til royndarvenjingar í Brøndby.

– Avtalan ber í sær, at Brøndby fær høvi at hyggja nærri at fleiri evnaríkum føroyskum leikarum, samstundis sum teir føroysku spælararnir fáa roynt síni evni á hægri støði enn til dagligt, og hetta er eitt gott høvi hjá teimum, sigur Jákup í Stórustovu.

Hann hevur í hesum umfari roynt at fingið spælarunum longri uppihald í útlendskum feløgum. Áður hava leikarar oftast vant í eina viku, men hetta hevur kanska verið heldur stutt.

Rókur verður væntandi í Brøndby í tríggjar til seks vikur. Soleiðis fær hann roynt seg í eitt longri tíðarskeið og kann harvið betra um sínar møguleikar at fáa ein sáttmála. Óvist er tó, hvussu leingi steðgurin hjá Róki verður í Brøndby. Hetta veldst um, hvussu væl tað gongur.

Rókur hevur eisini tilboð um at fara aftur til Nottingham Forest, har hann áður hevur royndarvant. Harumframt hevur Blackpool í Englandi eisini sýnt áhuga. Ungi havnarmaðurin hevur verið á fótbóltsskúla í Jyllandi, men hann valdi at gevast undan jólum og koma aftur til Føroyar.

Jákup í Stórustovu sigur, at føroyskir leikarar standa einki aftanfyri útlendskar, tá talan er um tekniskan førleika og skil fyri spælinum. Hinvegin eru teir nakað aftanfyri, tá skjótleika og konditión umræður.

**Eli Thorsteinsson í AGF**

Umframt avtaluna við Brøndby hevur Jákup í Stórustovu eisini fingið avtalu í lag við danska felagið AGF úr Århus. Avtalan er, at ungi havnarmaðurin Eli Thorsteinsson, sum hevur spælt við HB, skal venja við unglingaliðnum hjá AGF fram til summarsteðgin.

Eli hevur eins og Rókur Jespersen gingið á Hesselgods Fodboldskole í Jyllandi. Hann er tó enn á skúlanum, og hann hevur harumframt fingið møguleikan at venja við AGF um kvøldarnar eftir lokna skúlagongd.

Hetta gevur Eli Thorsteinsson møguleika at menna síni fótbóltsevni enn meira.

Allir leikararnir, sum nú venja við donskum feløgum, hava verið á føroysku ungdómslandsliðunum. At leikararnir eru sendir til Danmarkar at venja við útlendskum feløgum er framt í tøttum samstarvi við tey føroysku feløgini, har leikararnir hoyra heima.



*Leikaraumboðsmaðurin Jákup í Stórustovu hevur fingið avtalu í lag við Brøndby um at hyggja nærri at ungum føroyskum spælarum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Trygd stuðlar Skála

**Tryggingarfelagið Trygd skal hjálpa uppflytaranum Skála at tryggja sær framhaldandi sess í bestu deildini hjá monnum. Skála spælir við búmerkinum hjá Trygd á bringuni komandi ár**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Nýggja felagið í fyrstu deild hjá monnum hevur fingið nýggjan høvuðsstuðul. Skála skrivaði í seinastu viku undir sáttmála við tryggingarfelagið Trygd. Avtalan er galdandi í kappingarárinum 2002.

Hetta er fyrstu ferð í 37 ára longu søgu felagsins, at Skála roynir seg í fremstu mansdeildini. Tá liðið vann sær uppflyting seinasta ár, skrivaði felagið sostatt søgu.

Skála hevur brynjað seg út við trimum nýggjum spælarum og nýggjum venjara. Hetta skal styrkja liðið somikið, at tað megnar at varðveita sessin í 1. deild.

**Væl nøgdur**

Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd, er væl nøgdur við avtaluna, sum feløgini hava gjørt. Hann sigur, at tey bæði feløgini minna ikki sørt um hvørt annað.

Bæði eru gomul í garði, men økið, tey eru á í dag, er ókent land. Trygd er eitt gamalt felag, men tað er ikki fyrr enn seinastu árini, at tað er farið at tekna tryggingar. Skála er skjótt 37 ára gamalt, men hevur ikki verið í 1. deild áður.

Á Skála fegnast tey eisini um avtaluna. Hon er við til at leggja lunnar undir rakstrurin av felagnum, og hann er nógv broyttur, síðan felagið flutti upp.

– Tað skal meira til at fáa endarnar at røkka saman, nú vit eru við í 1. deild, og tí hevur henda avtalan stóran týdning, sigur Kurt Rasmussen, formaður í Skála.

**Styrkt lið**

Nýggjur venjari verður Mathias Davidsen úr Runavík. Hann hevur áður verið venjari hjá ungdómslandsliðum hjá Føroyum. Hetta er tó fyrstu ferð, at hann roynir seg sum høvuðsvenjara hjá einum 1. deildar felagi. At hjálpa sær hevur hann fingið skálamannin Hans Jákup Andreasen, ið verður hjálparvenjari.

Tríggir nýggir leikarar verða eisini at síggja í appelsingulu troyggjuni komandi kappingarár. Teir eru Dánjal Hansen, ið kemur úr NSÍ, Kári Nielsen, sum hevur spælt við B71, og Áki Petersen, sum áður hevur spælt við ÍF.

Tríggir ungir leikarar, sum helst verða nógv at síggja á liðnum hjá Skála.

Leikararnir eru farnir at venja til komandi kappingarár, og á Skála hava tey góðar vónir. Tó verður ásannað, at fremsta uppgávan hjá felagnum verður at varðveita plássið í bestu deildini.


# Verkfrøðingur

til Pf. Vágatunnilin

**Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og byggileiðslu og aðrar uppgávur, millum annað í sambandi við Norðoyatunnilin.**

**Førleikakrøv**

Tann rætti umsøkjarin

- er verkfrøðingur ella hevur líknandi útbúgving frá hægri lærustovni
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá projekterings- og byggileiðslu
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

**Lønar og setanartreytir**

Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@vagatunnilin.fo



Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. februar 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.vagatunnilin.fo